Viðmerkingar til løgtingslógina frá 1998

Almennar viðmerkingar
Galdandi lógir og reglur um verandi yrkisútbúgvingar eru løgtingslóg nr. 29 frá 12. oktober 1954 lærlingaviðurskifti við seinni broytingum, løgtingslóg nr. 43 frá 5. mai 1987 um Føroya Yrkisskúla fyri fiskiídnað og havbúnað við seinni broytingum, løgtingslóg nr. 49 frá 5. mai 1987 um grundútbúgving innan fyrisitingar-, handils- og skrivstovuøkið við seinni broytingum, løgtingslóg nr. 47 frá 28. apríl 1992 um støðisútbúgving innan tøkni við seinni broytingum, løgtingslóg nr. 128 frá 21. mai 1993 um tøkniligar yrkisútbúgvingar við seinni broytingum, løgtingslóg nr. 127 frá 21. mai 1993 um hægri handilsútbúgving við seinni broytingum og løgtingslóg nr. 129 frá 21. mai 1993 um hægri tøkniliga útbúgving við seinni broytingum.

Skúla- og útbúgvingarskipanir í Føroyum hava í stóran mun havt danskar skipanir sum fyrimynd, hóast at summar broytingar eru gjørdar væl seinni í Føroyum, og viðhvørt hevur verið hildið fast við ta gomlu skipanina í Føroyum, hóast fleiri nýskipanir hava verið settar í verk í Danmark. T.d. kom danska efg-skipanin frá 70-unum ongantíð at virka í Føroyum á handverksøkinum. Vit hava varðveitt lærlingaútbúgvingarskipanina. Men FHS, sum Føroya Handilsskúli fór undir í 1983, hevur hesa efg-skipan sum fyrimynd.

Hóast efg-skipanin og aðrar danskar nýskipanir ikki hava verið settar í verk innan lærlingaútbúgvingina/handverksvinnuna í Føroyum, er innihaldið av útbúgvingunum dagført, so hvørt broytingar hava verið í Danmark. Øll árini hevur neyvt samstarv verið við danskar skúla- og útbúgvingarmyndugleikar, so at t.d. lærlingar úr Føroyum eru farnir niður til Danmarkar at taka skúlapartar, ið ikki kunnu takast her heima.

Lágkonjunktururin í føroyska samfelagnum, sum byrjaði í 1989-90, rakti byggivinnuna serliga meint, og tí var lærlingatilgongdin á hesum øki lítil og eingin, tá fíggjarliga kreppan byrjaði í Føroyum. Løgtingið samtykti tí eina lóg um støðisútbúgving innan tøkni (SIT), so tey ungu, sum høvdu hug at fara undir eina útbúgving innan tøkni, í minsta lagi fingu eina 1-ára skúlagongd, ið var skipað sum støði undir framhaldandi útbúgving. Men av tí at vinnan ikki fekk lut í ábyrgd og stýring av SIT-skipanini, vórðu hesar útbúgvingar ikki góðtiknar sum partar av lærlingaútbúgvingunum. Síðan hava royndir verið gjørdar at fáa partarnar (t.e. vinnu- og skúlafólk) at gera eitt felags uppskot um broyting av SIT-lógini, so hon verður ein partur av yrkisskúla- og yrkisútbúgvingarlógarkompleksinum, og eitt uppskot um broyting av SIT-lógini verður samstundis lagt fyri løgtingið.

Uppskotið um yrkisútbúgvingarlóg snýr seg ikki um, hvussu tær einstøku útbúgvingarnar verða skipaðar, men um ein karm um heimildir og reglur á yrkisútbúgvingarøkinum.

Talan er um eitt uppskot um eina yrkisútbúgvingarlóg fyri handverk, handil v.m., sum øll vinnan tekur undir við. Bæði vinnan og skúlaverkið hava verið umboðað í 12-manna nevndini, sum tilevnaði álitið, ið liggur til grund fyri hesum lógaruppskoti, ið hetta lógaruppskot er bygt á.

Ein týðandi táttur í uppskotinum um eina yrkisútbúgvingarlóg er, at eitt útbúgvingarráð verður sett á stovn. Hetta ráð, sum í høvuðsheitum verður mannað við fólki úr vinnuni, og sum skal koma við tilmælum til landsstýrismannin í undirvísingarmálum um viðurskifti viðvíkjandi yrkisútbúgvingunum, verður sett av landsstýrismanninum.

Til tess at viðgera spurningar viðvíkjandi teimum einstøku útbúgvingunum verða settar yrkisnevndir, sum m.a. skulu samtykkja innihaldið í útbúgvingunum og í ávísum málum geva yrkisútbúgvingarráðnum tilmæli.

Skipanin um yrkisútbúgvingarráð og yrkisnevndir kemur í staðin fyri skipanina um læruráð og víðkað læruráð.

Tað er umráðandi, at SIT-lógin frá 1992 verður broytt samstundis, sum uppskotið um yrkisútbúgvingarlóg verður sett í gildi. Kjarnin í hesi broyting er, at yrkisútbúgvingarráðið ger tilmæli um tann yrkisliga partin av SIT-útbúgvingini. Hesi tilmæli byggja á samtyktir frá viðkomandi yrkisnevnd.

Lógaruppskotið fer at hava ein fíggjarligan meirkostnað fyri landskassan uppá kr. 400.000,- í 1999, orsakað av at yrkisútbúgvingarráðið nú kemur at telja 9 persónar, í mun til 3 persónar í nevndini fyri Føroya Læruráð (víðkað læruráðið 5 persónar). Fundarvirksemi væntast at verða væl meira enn áður, umframt at fleiri og nýggj økir verða at ráðgeva um. Skrivstovuhaldið og -hjálp til yrkisútbúgvingarráðið og nevndir tess væntast eisini at økjast munandi orsakað av hesum. Harumframt verður neyðugt at veita skrivstovuhjálp til yrkisnevndir innan smáar vinnugreinar. Upphæddin, kr. 400.000,-, er ikki sett av á løgtingsfíggjarlógaruppskotið fyri 1999.

12-manna nevndin, sum skrivaði "álit um yrkisútbúgvingarskipan", er tann fimta í røðini. Avvarðandi partar á arbeiðsmarknaðinum kenna álitið sera væl. Tí er lógaruppskotið ikki sent til ummælis hjá pørtunum.

Serligar viðmerkingar:
Ad. § 1: Landsstýrismanninum er í hesi lóg heimilað at skipa fyri yrkisútbúgvingum og arbeiðsmarknaðarútbúgvingum, herundir eftirútbúgving av yrkislærdum
Lógin avloysir verandi lóg frá 1954 um lærlingaviðurskifti.

Ad. § 2: Dentur verður lagdur á, at yrkisútbúgvingarnar eisini eru ungdómsútbúgvingar, og at tørvurin hjá arbeiðsmarknaðinum viðvíkjandi vinnu- og almennum førleika er nøktandi.

Ad. § 3: Meginreglan er, at skift verður millum verkliga læru á læruplássi og undirvísing í skúla. Skúlatíðin kann skifta frá 5 til 20 vikur. Útbúgvingarnar enda við útbúgvingarskjali, og endar útbúgvingin í flestu handverkaraútbúgvingum við einari sveinaroynd. Hetta eru somu meginreglur, sum eru galdandi í verandi lóggávu.

Ad. § 4: Landsstýrismaðurin í skúlamálum ásetir í kunngerð tær endaligu útbúgvingarreglurnar. Hetta er í samsvari við stýrisskipanarlógina um ráðharraábyrgd. (Smb. stk. 1).
Her nevnir lógin yrkisútbúgvingarráðið og yrkisnevndirnar á fyrsta sinni, og í stk. 2 og 3 verður víst til §§ 19-23 viðvíkjandi heimildum o.ø. hjá ráðnum og nevndunum.
At yrkisútbúgvingarráðið ger tilmæli er í samsvari við stýrisskipanarlógina, har landsstýrismaðurin fær ráðharraábyrgd og hevur endaligu ábyrgdina av útbúgvingar- og skúlamálum. (Smb. stk. 2-3).

Ad. § 5: Ein útbúgving kann verða løgd niður í eitt ávíst tíðarskeið uttan at verða tikin av, fyri síðani at verða tikin upp aftur. (Smb. stk. 1).
Talan er í høvuðsheitum um yrkisskúlar. Hesir eru: handilsskúlar og tekniskir skúlar. Sum frá líður møguliga eisini fiskivinnuskúlin. (Smb. stk. 3).

Ad. § 6: Reglan um, at tann, sum byrjar læru í einari yrkisútbúgving, skal hava fylgt undirvísingini til fráfaringarroynd fólkaskúlans (t.e. 9. flokk), er nýggj. Higartil hevur verið galdandi, at ein lærlingur skuldi vera lógliga útskrivaður úr fólkaskúlanum (t.e. 7-ára skúlagongd). (Smb. stk. 1).

Ad. § 7: Í fleiri yrkisútbúgvingum fer skúlagongdin fram í donskum yrkisskúlum. Tí er neyðugt, at avtalur verða gjørdar við skúlamyndugleikar og yrkisnevndir um skúlagongd og sveina- ella yrkisroyndir. (Smb. stk. 2).

Ad. § 8: Talan kann vera um eina góðskriving og stytting fyri næmingar, ið hava lokið aðra útbúgving, eitt nú grundútbúgvingina innan fyrisitingar-, handils- og skrivstovuyrki ella støðisútbúgvingina innan tøkni. (Smb. stk. 2).

Ad. § 9: Góðskriving av lærutíð ella skúlatíð hjá lærlingi við aðrari útbúgving ella arbeiðsoyndum verður samtykt av viðkomandi yrkisnevnd í hvørjum einstøkum føri.
Er talan um stytting av lærutíð, av tí at lærlingur frammanundan hevur lokið ein part av útbúgvingini ella hevur serligar fyritreytir til at fara undir ta útbúgving, lærusáttmáli fevnir um, kann viðkomandi yrkisnevnd, smb. § 35, samtykkja at stytta útbúgvingartíðina. (Smb. stk. 1).

Ad. §10: Stuðulsreglurnar eru at finna í lóg um yrkisskúlar. (Smb. stk. 1).
At skúlagongdin er ókeypis fyri lærlingar merkir, at skúli ikki kann krevja gjald frá lærlingum ella læruplássum fyri skúlagongdina. (Smb. stk. 5).

Ad. § 11: Ein týðandi táttur er, at útbúgvingin er dagførd og helst á odda í menningini í tøknifrøði, tilfari og fyriskipan á arbeiðplássunum. (Smb. stk. 1-2).

Ad. § 12: Um býtið millum yrkisgreinar, lærugreinar og vallærugreinar hevur verið havt í huga, at skipanin, smb. § 2, skal menna tann einstaka og hjálpa viðkomandi til samfelagsliga fatan, leggja grundarlag undir framtíðar yrki og framhaldandi útbúgving, og at nøkta tørvin hjá vinnuni, tá ið ræður um fakligan førleika og almennan kunnleika. (Smb. stk. 1-4).

Ad. § 13: Miðað verður ímóti, at yrkislærugreinirnar í byrjanini av útbúgvingini hava eina stóra, fakliga breidd, men so hvørt smalkast til ta sergrein, lærlingurin hevur gjørt sáttmála í. (Smb. stk. 1-3).

Ad. § 14: Møguleikarnir til at velja vallærugrein eru avmarkaðir vegna lítla lærlingagrundarlagið í Føroyum, fíggjarkarmar skúlanna og tøka serkunnleikan millum lærarar. (Smb. stk. 1-2).

Ad. § 15: Samstundis, sum lógin miðar ímóti, at útbúgvingin eisini skal verða ein ungdómsútugving, har lærlingurin fær undirvísing í almennum lærugreinum, miðar lógin eisini ímóti at javnstilla lærlingar, ið hava vantandi fortreytir, við aðrar lærlingar. (Smb. stk. 1-4).

Ad. § 16: Reglurnar eiga m.a. at fata um arbeiðstíðina hjá lærlingum, um feløgini á arbeiðsmarknaðinum ikki hava reglur hesum viðvíkjandi. (Smb. stk. 2).

Ad. § 17: Allir lærlingar skulu hava eitt útbúgvingarskjal, tá lærutíðin er lokin. Reglurnar um døming av lærlingum, sveinaroyndir o.a. miða móti einari stórari breidd í dømingarháttinum, bæði viðvíkjandi innihaldi og mannagongd í royndunum, herundir um møgulig sveinaroynd verður hildin, samanber § 18.

Ad. § 18: Um viðkomandi yrkisnevnd hevur samtykt, at sveina- ella yrkisroynd verður hildin í ávísari útbúgving, skulu upplýsingar hesum viðvíkjandi standa í sáttmálanum, og sveinabrævið verður í teimum førum partur av útbúgvingarskjalinum.

Ad. § 19: Ráðsskipanin við yrkisútbúgvingarráði og yrkisnevndum kemur í staðin fyri skipanina við læruráði og víðkaðum læruráði. Skipanin hevur fyrimynd í donsku lógini um yrkisútbúgvingar. Ráðsskipanin hevur til endamáls at geva vinnuni neyðuga ávirkan á útbúgvingarskipanina, so hon í mest møguligan mun samsvarar við ynskini hjá vinnuni. (Smb. stk. 1).
Ráðsskipanin er sett saman av:

- yrkisútbúgvingarráði við umboðum fyri vinnuna, og sum viðger yvirskipað mál og ger tilmæli til landsstýrismannin sambært teimum heimildum, tí eru givnar í hesi lóg og eftir viðtøkum, sum eru góðkendar av landsstýrismanninum, og
- yrkisnevndum, sum samtykkja útbúgvingarreglurnar fyri tær einstøku útbúgvingarnar o.a. innan karmarnar av hesi lóg og eftir viðtøkum, sum eru góðkendar av ráðnum.

Ad. § 20: Í yrkisútbúgvingarráðnum hava arbeiðsgevarar og løntakarar eins stóra umboðan við 4 limum hvør. Landsstýrið sum arbeiðgevari velur ein lim. Harumframt velur landsstýrismaðurin formannin, soleiðis at ráðið verður mannað við 9 limum.
Við verandi skipan á yrkisskúlaøkinum kunnu hesir skúlar senda eitt umboð á ráðsfund: Tekniski skúlin í Tórshavn, Tekniski skúlin í Klaksvík, Føroya Handilsskúli, Tórshavn, Føroya Handilsskúli, Kambsdalur, og Fiskivinnuskúlin, Vestmanna.

Ad. § 21: Meginreglan í ráðsskipanini er, at tað er útbúgvingarráðið, sum ger tilmæli til landsstýrismannin viðvíkjandi yrkisútbúgvingunum. Hugsandi er, at útbúgvingarráðið fer at hittast einar 4 ferðir um árið, har allir limirnir verða við í ráðsviðgerðini av einum máli, sama hvat yrki ella yrkisgrein, málið snýr seg um.

Ad. § 22: Uppgáva ráðsins at tilnevna yrkisnevndir er formlig, t.e. at ráðið sær til, at ein yrkisnevnd verður sett, men at viðkomandi yrkisfelag velur limirnar í nevndina.
Sum meginregla verða útreiðslurnar, ið standast av yrkisnevndararbeiðinum, goldnar av arbeiðmarknaðarpørtunum. (Smb. stk. 1-2).
Ávísar vinnugreinar kunnu verða so smáar, at trupult kann verða at rinda fyri skrivstovuhjálp. Tí kann tað verða neyðugt hjá landsstýrismanninum at veita yrkisnevndum hjá slíkum vinnugreinum hesa hjálp (smb. stk. 8).

Ad. § 23: Yrkisnevndirnar skulu taka upp spurningar viðvíkjandi teimum einstøku útbúgvingunum og samtykkja innihaldið í útbúgvingunum og í ávísum málum geva ráðnum tilmæli.

Ad. § 24: Við støði í teimum yvirskipaðu reglunum fyri hvørja útbúgving sær, sum yrkisnevndirnar gera, og sum yrkisútbúgvingarráðið ger tilmæli til landsstýrismannin um, verða ítøkiligar lesiætlanir gjørdar. Hesar lesiætlanir verða skúlarnir at gera.

Ad. § 25: Ein meginregla í skipanini er, at lærlingurin fær nøktandi upplæring í tí verkliga partinum í útbúgvingini. Læruplássini eiga tí at lúka neyðug krøv hesum viðvíkjandi. Viðkomandi yrkisnevnd er heimilað at ansa eftir, at tað einstaka virkið lýkur hesi krøv. (Smb. stk. 1-2).

Ad. § 26: Samtyktin, um eitt virki kann góðkennast sum læruplass, verður grundað á eina ítøkiliga meting. Ein yrkisnevnd eigur ikki at góðkenna læruplass eftir føstum reglum, men eigur hinvegin at tryggja, at góðkenningin er í samsvari við stevnumiðini fyri útbúgvingina. (Smb. stk. 1).

Ad. § 27: Lærusáttmálin fatar um rættarstøðu millum lærling og læruplass og skal fata um alla lærutíðina. (Smb. stk. 1-2).

Ad. § 28: Av tí at virki gerast alt meira sergreinað, og lærlingur tí ikki altíð kann fáa nóg fjøltáttaða læru á einum læruplássi, kunnu læruplass ganga saman um at útbúgva lærling. Læruplássini gera tá

hvørt sær sáttmála fyri tað ávísa tíðarskeiðið, sum samanlagt skulu fevna um alla lærutíðina. Eisini kann ávíst læruplass sambært 2. stk. gera sáttmála, sum fevnir um alla lærutíðina, men at hetta læruplass hevur ábyrgdina av, at lærlingurin í ávísum frammanundan ásettum tíðarskeiði kemur í læru á øðrum læruplássi. (Smb. stk. 1-2).

Ad. § 29: Reglan fatar um skyldu lærlingsins at luttaka í undirvísingini og skyldu hjá læruplássinum at geva lærlingi frí fyri at kunna luttaka í einari sáttmálaskyldugari skúlagongd. (Smb. stk. 1).

Ad. § 30: Neyðugt er, at heilt greiðar reglur eru um fráveru o.a. í undirvísingini. (Smb. stk. 1).

Ad. § 31: Sáttmáli millum læruplass og lærling kann bert gerast, um lógligu krøvini hjá báðum pørtum eru fullgyldug. Kravið til eitt læruplass er, at tað er góðkent sum læruplass í tí ávísu útbúgvingini, smb. § 26, meðan kravið til lærlingin er, smb. § 6, at undirvísingarskyldan er lokin. (Smb. stk. 1-2).

Ad. § 32: Broytingarnar, ið her verður sipað til, eru um uppsøgn av sínámillum avtalu, smb. § 38, stk. 1, um uppsøgn av sáttmálanum í royndartíðini, smb. § 38, stk. 2, og fráboðan um uppsøgn, smb. § 39, um semingsroyndirnar, smb. § 40, stk. 1, um rættarsøkina, smb. § 40, stk. 2, og avtaluna um leingjan av útbúgvingartíðini, smb. § 36.

Ad. § 33: Reglurnar hava við sær, at sáttmálaásetingin er bindandi fyri øll læruplass og lærlingar í tí ávísu útbúgvingini, líka mikið um læruplássið er limur í einum arbeiðsgevarafelag, ella um lærlingur er limur í einum yrkisfelagi. (Smb. stk. 1-6).
Endurrindan / endurgjald eru galdandi fyri allar lærlingar. (Smb. stk. 4-6).

Ad. § 34: Umframt tær ásetingar, sum eru í sáttmálanum, galda eisini aðrar, almennar lógir, herímillum lóg um starvsmenn og frítíðarlógin. Hesar lógir eru yvirskipaðar í mun til sáttmálaásetingar. (Smb. stk. 1).

Ad. § 35: Tað veldst tó um, hvussu long tíð er gingin, síðan lærlingurin hevur lokið nevnda part. (Smb. stk. 1).

Ad. § 36: Læruplass og lærlingur kunnu gera sínámillum semju um at leingja útbúgvingartíðina í tann mun, lærlingurin er burtur frá læruplássinum grundað á tey í a) til d) nevndu viðurskifti. Læruplássið hevur fráboðanarskyldu viðvíkjandi broyting í útbúgvingartíðini.

Ad. § 37: Sum dømi um stytting av útbúgvingartíðini eftir hesi grein kann nevnast, at læruplass heldur uppat, beint áðrenn lærlingurin hevur lokið útbúgvingartíðina, og at lærlingurin ikki kann fáa annað læruplass. Sum dømi um leingjan av útbúgvingartíðini eftir hesi grein kann t.d. verða, at lærlingurin skal standa eina revsing.

Ad. § 38: Sáttmálaskeiðið í einum útbúgvingarsáttmála hevur gildi, so leingi útbúgvingin varar. Vanligar avtalur á arbeiðsmarknaðinum um løn og tílíkt kunnu ikki ógilda ein útbúgvingarsáttmála. (Smb. stk. 1-3).

Ad. § 39: Lærusáttmáli kann ikki sigast upp, um lærlingur í eitt ávíst tíðarskeið verður útihýstur frá undirvísingini, fyri síðan seinni at byrja sama skúlaskeið aftur eftir reglunum um eykaundirvísing. (Smb. stk. 1-4).

Ad. § 40: Allar ósemjur um útbúgvingarsáttmála skulu leggjast fyri viðkomandi yrkisnevnd, sum skal royna semju. Bert tá ið yrkisnevnd ikki fær semju í lag, kann ósemja verða løgd fyri eina sáttmálanevnd. (Smb. stk. 2).

Ad. § 41: Tað er landsstýrismaðurin, sum setir sáttmálanevndina og tilnevnir limir hennara. Sáttmálanevndin hevur 3 limir: Yrkisfeløgini fyri avvarðandi yrkisgrein velja hvønn sín lim, og landsstýrismaðurin triðja limin, ið er formaður og skal vera løgfrøðingur. (Smb. stk. 1).

Ad. § 42: Partarnir hava møguleika at leggja úrskurð sáttmálanevndarinnar fyri Føroya Rætt.

Ad. § 43: Skaðatryggingin hjá lærlingum við lærusáttmála fylgir teimum reglum, ið galda fyri lærlingar eftir verandi skipan. Teir næmingar, sum skúlin tekur upp til eina støðisútbúgving, og sum ikki hava lærusáttmála, hevur skúlin skyldu at skaðatryggja.

Ad. § 44: Um frávik frá reglunum í 3. og 4. tátti verða framd, eiga hesi at verða greitt lýst, bæði tá ið viðvíkir innihaldinum og tíðarkørmunum fyri ætlanini.

Ad. § 45: Reglurnar eiga, umframt at nøkta faklig førleikakrøv, eisini at verða samskipað við almennu førleikakrøvini hjá lærarum í miðnámsútbúgvingunum.

Ad. § 46: Sum dømi kunnu reglurnar fata um avgerð skúlanna um útihýsing av lærlingi frá undirvísingini, smb. § 30 og aðrar avgerðir, sum skúli tekur í sambandi við skúlagongdina hjá lærlingum, um reglur ikki á annan hátt eru ásettar.

Ad. § 47: Løgtingslóg nr. 49 frá 5. mai 1987 um grundútbúgving innan fyrisitingar-, handils- og skrivstovuyrkið og løgtingslóg nr. 47 frá 28. apr. 1992 um støðisútbúgving innan tøkni eiga at verða broyttar, so at hesar eru í samsvari við hesa lóg. Eisini eiga hesar lógir at fata um reglur, sum áseta, at ráðsskipanin hevur somu heimildir, sum tær hava í hesi lóg við atliti at teimum yrkisligu pørtunum. (Smb. stk. 3).

1. viðgerð 13. november 1998. Løgtingsmálini 32 og 33 viðgjørd undir einum. Málini beind í mentanarnevndina, sum tann 15. december 1998 legði fram soljóðandi

Á l i t

Málið er lagt fram av landsstýrinum tann 6. november 1998 og eftir 1. viðgerð tann 13. november 1998 beint í mentanarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundum, tann 24. november 1998, 30. november 1998 og 11. desember 1998.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýrismannin í undirvísingar- og mentamálum, Signar á Brúnni.

Nevndin hevur fingið skriv frá Føroya Arbeiðsgevarafelag, Havnar Handverkarafelag og frá landsstýrismanninum við viðmerkingum til málið.

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur skotið upp, at stk. 3 í § 10 verður orðað soleiðis, at útreiðslurnar av sveinaroyndum verða býttar millum landskassan og yrkisfeløgini eftir reglum, sum landsstýrismaðurin ásetir eftir tilmæli frá yrkisútbúgvingarráðnum. Viðmerkt verður, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum ikki góðtaka bara at hava ummælisrætt.

Í samráð við landsstýrismannin er nevndin komin til ta niðurstøðu, at hon vil skjóta upp, at § 10, stk. 3 verður broytt soleiðis, at hon verður í samsvari við álitið frá nevndini, sum hevur gjørt lógaruppskotið. Býtið av útreiðslunum verður sambært hesum ásett eftir samráðing við yrkisfeløgini á arbeiðsmarknaðinum.

Arbeiðsgevarafeløgini skjóta eisini upp, at stk. 7 og 8 í § 22 verða orðað soleiðis, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum rinda umboðum sínum í yrkisnevndum fundarpening og ferðaútreiðslur, og at landsstýrismaðurin eftir tilmæli frá ýrkisútbúgvingarráðnum kann gera av at rinda heilt ella partvíst fyri skrivstovuhjálp hjá yrkisnevndum. Arbeiðsgevarafeløgini halda ikki, at trupulleikin er at rinda fyri skrivstovuhjálpina, heldur er tað so, at feløgini ikki hava professionella umsiting, ið er før fyri at fyrireika nevndararbeiðið og at fáa nevndararbeiðið á hóskandi skrivligan form, sum kann latast yrkisútbúgvingarráðnum.

Nevndin kann taka undir við hesi broyting og hevur fingið upplýst, at eisini landsstýrismaðurin tekur undir við broytingini.

Havnar Handverkarafelag ger vart við orðingina, at Føroya Handverkarafelag umboðar handverkararnar. Felagið vísir á, at hetta ikki er heppið, við tað at Havnar Handverkarafelag fer burtur úr Føroya Handverkarafelag, og er hetta helst galdandi fyri onnur feløg við. Hetta, sigur felagið, kann føra til, at Føroya Handverkarafelag verður ein minniluti. Havnar Handverkarafelag mælir tí til, at orðingin verður broytt til at verða "umboð fyri handverkarafeløgini", í staðin fyri "umboð fyri Føroya Handverkarafelag".

Nevndin hevur sett landsstýrismanninum fyrispurning hesum viðvíkjandi.

Landsstýrismaðurin sigur, at: "Tá ið slíkur lógartekstur verður orðaður, eigur greitt at standa, hvør eigur at verða umboðað av hvørjum.

Vanligt er, at tað eru tey virknu fakfeløgini á arbeiðsmarknaðinum, ið hava umboð í slíkum ráðum. Virkin feløg verða vanliga allýst, sum tey feløg, sum hava sáttmála á arbeiðsmarknaðinum, t.v.s. sáttmála millum arbeiðstakarar og arbeiðsgevarar. Sum støðan er í dag, hevur Føroya Handverkarafelag sum meginfelag sáttmála vegna handverkarafeløgini. Hesin sáttmáli gongur okkum kunnugt ikki út fyrr enn í fyrsta lagi 01.10.2001. Sambært hesum er Havnar Handverkarafelag ikki "virkið" á arbeiðsmarknaðinum orsakað av, at felagið ikki hevur nakrar sáttmálar á arbeiðsmarknaðinum.

Undirvísingar- og Mentamálastýrið mælir mentanarnevndini til at varðveita upprunaligu orðingina í § 20, stk. 4."

Nevndin er samd um ikki at gera nakrar broytingar í sambandi við skrivið frá Havnar Handverkarafelag.

Ein samd nevnd tekur undir við málinum, men mælir løgtinginum til at samtykkja uppskotið við niðanfyristandandi:

b r o y t i n g a r u p p s k o t i
til
uppskot landstýrisins

1) Í § 10, stk. 3 verða orðini "ummæli frá yrkisfeløgunum" broytt til "samráðing við yrkisfeløgini".

2) § 22, stk. 7 verður orðað soleiðis: "Partarnir á arbeiðsmarknaðinum rinda umboðum sínum í yrkisnevndum fundarpening og ferðaútreiðslur."

3) § 22, stk. 8 verður orðað soleiðis: "Landsstýrismaðurin kann eftir tilmæli frá yrkisútbúgvingarráðnum gera av at rinda heilt ella partvíst fyri skrivstovuhjálp hjá yrkisnevndum."

4) § 23, stk. 1, 1. pkt. verður orðað soleiðis: "Fyri tær útbúgvingar, ið eru góðkendar, ásetir landsstýrismaðurin, eftir tilmæli frá yrkisnevndunum, reglur um:".

5) § 23, stk. 2 verður strikað, og stk. 3 til 5 verða hereftir stk. 2 til 4.

6) Í § 47, stk. 3 verður aftaná orðini "løgtingslóg nr. 128 frá 21. mai 1993" sett orðini "við seinni broytingum".

Viðmerkingar:

Ad. 1-3) Víst verður til almennu viðmerkingarnar omanfyri.

Ad. 2-4) Talan er um tekniskar broytingar, sum verða gjørdar í samráð við landsstýrið.

2. viðgerð 18. december 1998. Broytingaruppskot frá samdari mentanarnevnd samtykt 24-0-0. Uppskotið soleiðis broytt samtykt 24-0-0. At málið soleiðis samtykt kann fara til 3. viðgerð samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

Á tingfundi 23. december 1998 løgdu tingmenninir Jógvan á Lakjuni, Annita á Fríðriksmørk, Finnur Helsmdal, Jenis av Rana, Heðin Mortensen, Katrin Dahl Jakobsen og Jóanis Nielsen fram soljóðandi

B r o y t i n g a r u p p s k o t
til
uppskot landsstýrisins

Í § 10, stk. 3 verða orðini "samráðing við yrkisfeløgini á arbeiðsmarknaðinum" broytt til "tilmæli frá yrkisútbúgvingarráðnum".

3. viðgerð 23. december 1998. Broytingaruppskot frá Jógvan á Lakjuni, Annitu á Fríðriksmørk, Finni Helsmdal, Jenis av Rana, Heðin Mortensen, Katrin Dahl Jakobsen og Jóanis Nielsen samtykt 28-0-0. Uppskotið, sum samtykt við 2. viðgerð og soleiðis broytt, endaliga samtykt 28-0-0. Málið avgreitt.

J.nr. 2116-18/96
Ll. nr. 94/1998 frá 29.12.1998